# BØNARLØTAN

**OKTOBER** **2022** **37. árg.**

## *1. Leygardagur* *Fil. 2.19-30*



*Fimm biðja hvør sær fyri teimum fimm doyptu. Cecile í miðjuni*

25. september vórðu fimm doypt, ein genta og fýra dreingir, 15 - 22 ár. Vikuskiftið 1 - 2. oktober verða legur fyri 7 -11 ár og 12 - 14 ár í St. Lunaire við Ermasund. 30. okt. – 5. nov. hevur Cécile ábyrgd av vikulegu fyri sama aldur, eisini í St. Lunaire. Hetta er sunnudagsskúla- og ítróttarlega, har børnini læra eina nýggja ítrótt hvønn seinnapart.

**KRINGVARPIÐ**
2. okt. útvarpmøti, mansstevnan, Zarepta
2. okt. sjónvarpsandakt, Høgni Johannesen

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukvøld kl. 21.00. Kelduvaðið (endursent hóskvøld kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00. Á torginum (endursent sunnudag kl. 12.30)

## *2. Sunnudagur* — *1. Sám. 9.1-27*

**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**
Fyri okkum, sum hava verið við í verkinum í Kristnastovu síðan byrjan í sept. 1973, er tað ein stór gleði enn einaferð at síggja hølini fylt aftur við yngri fólki, ið eru komin til Danmarkar í útbúgvingarørindum - nøkur teirra á fyrsta sinni. Biðið, at tey verða varðveitt í trúnni og halda á at savnast um orð Guds við øðrum trúgvandi. berghamar@kristnastova.dk

**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 15, Andreas13, Kristina 11**

## *3. Mánadagur* — *Fil. 3.1-21*

**ZAREPTA**
Heystlegan, 15 – 17 ár verður
7 – 12. okt.



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
Ferðin til Lviv í Ukraina gekk væl. Harrin signaði ferðina. Eftir IBCM stevnuna í sept. varð Simon verandi í

Tirana, Sarajevo, at vitja trúboðarar. So skal hann til Peje í Kosovo, tá trúboðar har hittast til samfelag og bøn. Hann kemur heim aftur síðst í okt. Dorit skuldi vera við, men mátti fara heim at hjálpa til við sjúku ommudóttrini.

*Í dag fyllir Nana Mortensen 11 ár

## *4. Týsdagur* *1. Sám. 10.1-27*



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Umleið 160 børn og ung komu á legu í summar. Biðið serliga fyri teimum, sum søgdu, at tey vildu fylgja Jesusi. Takk fyri bøn og stuðul.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 13, Ester 12, Samuel 8**

## *5. Mikudagur* *Fil. 4.1-23*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
John hevur saman við Calvary Church útvarpsrásina The Verdict, sum sendir dagliga í Amerika og í nógvum øðrum londum. Í Stórabretlandi verður sent ígjøgnum Trans World Radio. Biðið, at tey, sum lurta, venda sær til Harran. Leinkjan til útvarpsrásina: via TVR-UK, og theverdict@calvarychurch.com

## *6. Hósdagur* *Sálm. 47*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit endurskoða Matteusarevangeliið og mugu tryggja okkum samsvar við hini evangeliini. Telduforrit er góð hjálp, men tað tekur nakað av tíð. Biðið um vísdóm.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 14, Jónatan 13, Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Biðið, at bróðurkærleikin í samkomuni í Puruandiro alsamt veksur, og at tey ungu verða styrkt í trúnni. Vit eru komin til Esbjerg í farloyvi og gleða okkum eisini at virka her.

## *7. Fríggjadagur* *Ezra 6.1-22*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg vænti at koma aftur til Senegal 10. okt. og verði í Dakar nakrar dagar, áðrenn eg fari út aftur til bygdina. Eg skal t.d. bíleggja nýggj battarí til sólorkuskipanina. Biðið, at eg fái tey røttu, og at eg komi trygt aftur til bygdina. Nógv fyrireiking er í sambandi við, at umsetingarráðgevin vitjar aftur í nov.

## *8. Leygardagur* *Op. 6.1-17*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 14**

Stevn heimasíðan verður klár í næstum. Stevn krevur nógva tíð og orku frá okkum. Biðið, at vit leggja okkara tíð betur til rættis, nú vit hava nógv jørn í eldinum.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

## *9. Sunnudagur* *Ezra 7.1-28*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Nýggj fólk eru byrjað at koma í okkara samkomu gjøgnum summarið. Biðið, at vit fevna tey, og at tey finna sítt pláss millum okkara. Biðið eisini, at vit røkka út til tey, vit sakna.

## *10. Mánadagur* *Op. 7.1-17*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**

Claire dagførir handbókina Funding the Family Business til nýggjar trúboðarar. Bókin skal eggja og stuðla í peningaligum, kenslu-

ligum og andaligum viðurskiftum í sambandi við trúboðan. Henni tørvar vísdóm til rættar orðingar og innihald.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 7, Natan 4**

## *11. Týsdagur* — *Ezra 8.1-20*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Minnist Glostrup Frikirke, at Harrans orð má hava framgongd. Í einum heimi, har alt støðugt broytist, gleðast vit um, at Harrin er hin sami til ævigar tíðir.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Vit vilja gjarna hava samband við fastbúgvandi føroyingar á Fyn.



## *12. Mikudagur* — *Op. 8.1-13*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
12. okt. fara vit til Malaysia, har eg skal tala og vitja vinir í Kuala Lumpur. Vit fyrireika okkum eisini til altjóða skeiðið í Teilandi í nov., har um 230 NTM leiðarar og ráðgevarar luttaka. Vit hava biðið tríggjar menn, sum ikki eru í NTM at hava ein boðskap til okkara. Tveir eru samkomupastorar í ávikavist Bangkok og í Manila, meðan hin triðji er fyrrv. muslimur, ið vaks upp í Afrika, men er nú professari á einum kristnum universiteti í Týsklandi.

## *13. Hósdagur* *Sálm.48*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Seinasta legan í ár var 13-16. sept. Vit leigaðu til Familiucentrið, ein kommunalan stovn, sum arbeiðir við ymiskum familjutrupulleikum, har serkøn taka sær av klientunum á leguni, og vit hava andakt og sang. Ígjøgnum árini hevur hetta verið eitt sera gott samstarv. Eli Smith kom yvir at hjálpa við sanginum. Sum útbúgvin teknikari loysti hann eisini nógvar praktiskar trupulleikar við oljufýrum, landløðing til Juvel og el-verkinum á legunum.




**GRØNLAND**
**Juvel II**

## *14. Fríggjadagur* *Ezra 8.21-36*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit byrjaðu bíbliutímar aftur í aug., og ein er komin aftrat. Biðið, at Harrin talar við hana og letur upp eyguni fyri evangeliinum. Daniel hevur tørv á heilsubót – biðið um skjóta skurðviðgerð.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

## *15. Leygardagur* *Op. 9.1-21*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Seks saafitrúgvandi hittu Augustin og Moussa í Onesimus-húsinum. Hesi ungu hava fingið undirvísing í Skriftunum. Tey hava fleiri góð hugskot um, hvussu tey kunnu luta Orð Guds m.a. við at gera samansett tiltøk við ítrótti og bíbliusøgum. Tað ber til at stuðla hesum virkseminum. Vit takka fyri heilsu og styrki. Okkum tørvur vegleiðing at fyrireika lærutilfar at leggja á netið.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



**FØROYAR**
- **Elin og Jógvan Jacobsen**
- **Unn og Jógvan Zachariassen**
- **Lis Zachariassen**
- **Annika og Poul Færø**
- **Anna og Óli Steinberg**
- **Maria og Jens Bech**

## *16. Sunnudagur* *Ezra 9.1-15*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8**
Vit eru í holt við at opna eina nýggja miðstøð í Spania fyri trúboðarar úr Suðurafrika, sum arbeiða í Afrika og Evropa. Okkum tørvar vísdóm, sum vit arbeiða fram ímóti hesum.

**Atlantic Mission, Juvel II**

**Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 8**
Í okt. luttaka vit í Sarons Dal, Kvinesdal og Kristiansand í Noregi við sangi og vitnisburði. Fyrispurningar eru eisini um at hava evangelisk tiltøk 2023. Eg eri við til andaktir á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sambýlum og Herberginum í Havn. Sóttarløtan verður send av og á gjøgnum veturin. Minnist børn og ung í samkomunum, tey eru framtíðin.
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *17. Mánadagur* — *Op. 10.1-11*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**
Nógv trýst liggur á okkum, nú fleiri stuðlar eru fluttir. Biðið um styrki, vísdóm og eyðmjúkleika í hesum tíðum, og at Harrin skal senda røttu hjálparfólkini til røttu tíð.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Týsdagur* — *Ezra 10.1-19*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 10, Emma 6**
Haldið á at biðja fyri samkomu okkara í Italia, at Harrin styrkir og varðar tey hesa tíðina, vit eru í Føroyum.

## *19. Mikudagur* *Op. 11.1-19*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Logos Hope vika er 19-27. okt. Tá koma Myles og Andy Juliff at vitja. Logos Hope er nú í Albania og heldur fram at vitja havnir í Miðalhavinum hetta árið. Hans Elttør úr Klaksvík verður umborð í 3 mánaðir sum Project worker, og Esther Dam Hansen úr Danmark verður umborð í 1 ár. Biðið Harran leiða og varðveita øll umborð.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

KT-tænastan hjá bíbliubrævskeiðnum bleiv uppstigað í summar, og ávirkaði hetta lýsingarnar, sum tí ikki vórðu regluliga sendar út hetta tíðarskeiðið. Tey, sum luttaka regluliga við spurnarbløðunum, hava tó verið tey somu, og vit eru takksom, at nøkur eru løgst aftrat samkomuni her, og at uppfylgingararbeiðið hjá bcc gongur væl.

*Í dag fyllir Ester Mikkelsen 12 ár

## *20. Hósdagur* *Sálm. 49*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Samkomulega verður í heystfrítíðini, 20. til 23. okt. Biðið fyri leguni, at Harrin signar Orð Sítt og samfelagið.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Vit vera við til heystleguna hjá Kristnastovu nú í heyst. Fari at tosa um Jákup, tá ið hann møtti Harranum við Jabboksløk.

*Í dag fyllir Debora Christiansen 7 ár
*Í dag fyllir Abigail Mortensen 4 ár

## *21. Fríggjadagur* — *Josva 7.1-26*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 8, Abigail 4**
Vit gleðast um føroyatúrin – fyri samveru við familju og vinir, fyri vitjanir í Betesda og Ebenezer. Vit høvdu ein deiligan OM-dag í Skansahúsinum, har vit hittu aðrar trúboðarar. At Jóhannis nú hvønn mána- og fríggjadag arbeiðir í samkomuni er satt bønarsvar. Biðið um vísdóm og Guds leiðslu, og at vit fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

## *22. Leygardagur* — *Áp. 4.21-37*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Í sep. var eg í bygdini Nayba. Vit rættlósu og prentaðu tilfar til Tessalonikabrøvini. Eisini vitjaðu vit samkomur har, t.d. eina, sum er úrslitið av einum bíbliutíma, vit byrjaðu, tá korona herjaði uppá tað ringasta. Fólk vitnaðu, og eg talaði á møtinum. Næsta bræv á skránni til lærutilfar er Rómbrævið. Biðið fyri hesum stóra arbeiðnum.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**



*Í dag fyllir Sarah Mortensen 12 ár

## *23. Sunnudagur* *Josva 8.1-17*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**

Harður jarðskjálvti hevur verið í PNG. Hetta ávirkaði húsini hjá okkum og starvsfeløgunum. Vit prísa Gudi fyri, at ongin fekk skaða, og at hús okkara ikki fingu so stóran skaða.

## *24. Mánadagur* *Áp. 5.1-20*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2,**
**Olivia 0**

Biðið fyri okkum sum familja, nú vit eru 6 í tali, at vit fáa øll neyðug skjøl til lítlu dóttur okkara, Oliviu, sum vit fingu 18. sept., so at vit kunnu fara úr Florida til Papua Nýguinea í jan. Komandi mánaðirnar fyrireika vit ferðina.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



*Í dag fyllir Natan Christiansen 4 ár

## *25. Týsdagur* — *Josva 8.18-35*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 1**
Biðið, at vit gera framstig í málinum og mentanini, fyri tryggari viðgongutíð hjá Krissy og barninum, og fyri at vit skjótt fáa langtíðarvisum, tí tað hevði bøtt um okkara møguleikar.

## *26. Mikudagur* — *Áp. 5.21-42*

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**



Fyri góðum ári síðani tók Taleban aftur ræðið í Afghanistan. Nógv kristin rýmdu, og umstøðurnar hjá teimum, ið vórðu verandi, eru versnaðar. Ófriður í Iran hevur avmarkað internetsamband við landið. Biðið fyri Iran og Afghanistan.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**

## *27. Hósdagur* — *Sálm. 50*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Vit byrja at umseta Jóhannesevangeliið til deyvamál bæði á donskum og føroyskum við stuðli frá Deaf Bible Society. Seinasta vikuskiftið í okt. verður heyststevna í Vejle.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Fríggjadagur* — *Josva 9.1-15*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
28. okt vitji eg Sorimi. Biðið fyri teim trúgvandi, at tey standa føst í trúnni. Seinnu helvt av ferðini vitji eg býin Wewak at arbeiða við bíbliuumsetingini saman við tveimum brøðrum.
*Í dag fyllir Jónatan Tuohy 13 ár



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**

## *29. Leygardagur* — *Áp. 6.1-15*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Í heyst skipa vit fyri fyri barna- og evangeliskum møtum í Hólmahúsinum á Eiði. Møtini verða 29. okt. kl. 19.30 og

30. okt. kl. 17. Oasubrøður og Eyðun Jacobsen við ljómliði syngja.

## *30. Sunnudagur* *Josva 9.16-27*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 8, Rio 3**



Vit umhugsa at broyta møtið sunnudag ella kanska hava eitt aftrat, sum ger tað lættari hjá nýggjum trúgvandi at koma. Biðið fyri hesum.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**
**113 síður**
**70 kr**

Women of Hope arbeiðir saman við Trans World Radio millum kvinnur um allan heim, sum liva í kúgan og trældómi. Marli Spieker, sum stovnaði felagsskapin, greiðir sjálv frá Women of Hope; harumframt lýsa níggju kvinnur ta umbroyting, sum fer fram, tá Jesus kom inn í lív teirra. Fyri stuttum vitjaði Peggy Banks, ein av leiðarunum, í Føroyum.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.–frí. kl. 14.00–17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos